## Gitið um úrslit og málskjúttar

*Umframt sjálva tippingina, hevur dansk tipstjeneste eisini hópin av øðrum spølum. Eitt teirra er matchen*

Jákup Mørk

Nú vit nærkast summarfrítíðini, er rættuliga vanligt, at hugurin hjá veddingarmonnunum at tippa, er nakað avmarkaður, tá allar tær stóru europeisku kappingarnar halda frí í einar tveir mánaðir.

Europameistarakappingin í fótbólti stendur tó fyri framman, og eitt hitt best dámdi eydnu- ella vitunarspæl í slíkum man vera sonevnda »Matchen«.



*Veddingarseðilin, sum skal nýtast til matchen*

**Gita úrslit**

Í matchen ræður um at gita seg fram til, júst hvørjum úrslitið ein ávísur dystur endar við.

Ymisk odds eru fyri ymsu úrslitini, og eru hesi sett alt eftir mettu sannlíkindunum fyri endaliga úrslitinum.

Er t.d. odds 3 galdandi fyri 1-0 til heimaliðið, fært tú innskotið tríggjar ferðir aftur, um tú hevur kollgitt hetta úrslit.

Á sama hátt ber til at gita, hvør verður fyrsti málskjútti í dystinum, eins og hvat liðunum hevur leiðsluna, ávíkavist í hálvleikssteðginum og við leiklok.

Eisini her eru ymsu sannlíkindini sett upp í einum skema, soleiðis at t.d. verður roknað meira sannlíkt, at Michael Owen verður fyrsti málskjútti heldur enn David Seaman.

Alt í alt eitt sera undirhaldandi slag av vitunarspæli, har tað heldur ikki er neyðugt at nýta kostnaðarmiklar skipanir fyri at hava møguleika at vinna.

Hinvegin eru vinningarnir heldur ikki so stórir í hesum, men stuttleikin er tað í øllum førum.

# Gekk ikki hjá Jan

*Liðskiparin á KÍ liðnum, Jan Joensen, hevði ikki eydnuna við sær, tá hann um vikuskiftið skuldi gita um úrslitini á tipsseðlinum*

Jákup Mørk



Seinasti av liðskiparunum, sum royna seg í tipping á hesum síðum, var KÍ'arin, Jan Joensen.

Eins og undangongumenn sínir skuldi Jan nýta U-4-6-100 skipanina, og meðan tað gekst honum rættuliga væl at seta krossin á rætt U-tekn, so var hann ikki eins heppin, tá sikrir dystir og hálvgarderingar skuldu finnast.

**7 U-tekn**

Tað var nevnliga bert dystur nr. 8, Celtic-Aberdeen, sum Jan hevði rættan av teimum trimum sikru dystunum.

Hinir báðir, Middlesbrough-Watford og Hearts-St. Johnstone, endaðu báðir 0-0, og í báðum førum hevði Jan valt sær eitt-talið sum úrslit.

Heldur ikki við hálvgarderingunum gekst nakað serligt, tí av teimum seks, vóru bert fýra rættar. Her vóru tað javnleikurin í dysti 3, Derby-Newcastle, og útisigurin í dysti 13, Sporting Lissabon-Benfica, sum kostaðu.

Gekst ikki væl við omanfyrinevndu lutum, so var støðan øðrvísi, tá um ráddi at seta rætta U-tekni.

Av teimum átta garderingunum, har Jan hevði fanga úrslitið, vóru heili 7 U-tekn røtt, og hetta má metast sum sera gott.

Hetta gav eisini útslag í, at Jan hevði eitt rað við 9 røttum, men hetta kastar tó ongan vinning av sær.

Komandi viku skal gøtumaðurin, Magni Jarnskor aftur royna seg.

Fyrstu ferð hevði hann 11 rættar krossar, harav 8 røtt U-tekn, so spennandi verður um hann megnar at gera tað enn betri hesaferð.

## Úrslitini um vikuskiftið

| Dystur | Úrslit | Tekn |
|---|---|---|
| 1 Arsenal-Chelsea | 2-1 | 1 |
| 2 Coventry-Sheffield W. | 4-1 | 1 |
| 3 Dery-Newcastle | 0-0 | X |
| 4 Leicester-Bradford | 3-0 | 1 |
| 5 Middlesbrouhg-Watford | 1-1 | X |
| 6 Sunderland-West Ham | 1-0 | 1 |
| 7 Wimbledon-Aston Villa | 2-2 | X |
| 8 Celtic-Aberdeen | 5-1 | 1 |
| 9 Dundee FC.-Dundee U. | 3-0 | 1 |
| 10 Hearts-St. Johnstone | 0-0 | X |
| 11 Motherwell-Hibernian | 2-0 | 1 |
| 12 W. Bremen-B. München | 0-2 | 2 |
| 13 Sp. Lissaban-Benfica | 0-1 | 2 |

**Vinningar:**

13 røtt 222.948 kr.
12 røtt 2.231 kr.
11 røtt 191 kr.
10 røtt 36 kr.

## Soleiðis veddaði Jan

| Dystur | Tekn | U |
|---|---|---|
| 1 Arsenal-Chelsea | 1X | **1** |
| 2 Coventry-Sheffield W. | 1X2 | **1** |
| 3 Dery-Newcastle | 12 | 2 |
| 4 Leicester-Bradford | 12 | **1** |
| 5 Middlesbrouhg-Watford | 1 | |
| 6 Sunderland-West Ham | 1X2 | **1** |
| 7 Wimbledon-Aston Villa | 1X2 | **X** |
| 8 Celtic-Aberdeen | 1 | |
| 9 Dundee FC.-Dundee U. | 1X | **1** |
| 10 Hearts-St. Johnstone | 1 | |
| 11 Motherwell-Hibernian | 1X | **1** |
| 12 W. Bremen-B. München | 1X2 | X |
| 13 Sp. Lissaban-Benfica | 1X | 1 |

**Úrslit**

Røtt í skipanini: 9
Røtt U-tekn: 7

**Vinningar**

Eingin

# ÍSB tveir norðurlendskar meistarar

*Bæði Jógvan Telling Joensen og Áki Joensen vunnu gullmerki, nú ÍSB um vikuskiftið hevði sent landsliðið í Boccia til Íslands*

Um vikuskfitið varð norðurlandameistarakapping í boccia hildin í Keflavík í Íslandi. Boccia er eitt bóltspæl, sum er smíðað til rørslutarnað.

Ítróttafólkini verða flokkað eftir brekið: Teir, ið sita í koyristóli og nýta slidsku eru í einum flokki, teir í koyristóli, sum nýta hendurnar, eru í einum flokki, og endilga eru teir íðkarar, sum standa og kasta bólkaðir fyri seg.

ÍSB sendi fýra luttakarar til Íslands, og ikki kann sigast annað enn, at væl kom burtur úr hesum. Ungi og evnaríki Áki Joensen vann gullmerki í sínum bólki, meðan Jógvan Telling Joensen, sum er meira royndur og nærlagdur, eisini vann sær gullmerki.

Harmumframt megnaði føroyska liðið at vinna bronsu í liðkappingini, og eisini hetta má metast sum eitt heilt gott úrslit.

Á føroyska liðnum vóru Jógvan Tellin Joensen, Marius Johansen og Sámal Jacobsen.

Føroyingar hava leikt boccia síðani miðskeiðis í áttatiárunum, og er hetta fyrstu ferð at tað hevur eydnast at vinna heiðursmerki í norðurlendskum høpi. At so tvey av hesum vóru úr gulli, ger ikki avrikið minni gott!

Stuðla ferðini hevði nýggi høvuðsstuðulin hjá ÍSB, Føroya Lívstrygging.

*Jógvan Telling var ein teirra, sum kom heim aftur við gullmerki um hálsin*





**Viðmerkingar:**

*Søgulig tingseta:*

# Løgtingið hevur partvíst avtikið seg sjálvt

Henda júst farna tingsetan er heilt serlig av tveimum orsøkum. Tingið gjørdi av, at nú skuldi tað markerast sum eitt rættulig "parlament" við tilsvarandi tign. Fyrsta stig var lønarhækkingin í vár saman við dupultum endurgjaldi fyri útreiðslum hjá tingmonnum. Tað næsta skal vera eitt glæsiligt og tignarligt tinghús.

Samstundis gjørdi løgtingið tað søguligu samtykt, at landsstýrið hevur ikki skyldu at fremja løgtingslógir, sum tí ikki dámar.

Tað er fyrr skrivað um hetta mál. Men nú kann staðfestast, at løgtingið er meira eitt eiti enn eitt veruligt ting.

**Løgtingið skuldi verið hægsta vald**

Samb. nýggju stýrisskipanarlógina hevur tingið tvinnar høvuðsuppgávur. Onnur er at løggeva. Hin er at hava eftirlit við at løggávan verður fylgd. Í hesi seinni uppgávuni hevur tingið fleiri tól. Tey eru 1. at seta fyrispurningar til landsstýrismann 2. landsstýris-málanevndin, har andstøðan hevur meirilutan, sum hevur heimild at seta kanningarstjóra at kanna ivamál og 3.misálit á landsstýrismann.

Fyri landsstýrið er annars galdandi lóg um ábyrgd landsstýrismanna, har tað er ásett revsing upp til 2 ára fongsul fyri landsstýrismann, sum skúgvar til viks tær skyldur hann hevur ella hann gevur løgtinginum skeivar upplýsingar.

Hetta merkir at allar rammur er í lagi fyri at borgararnir kunnu føla seg tryggar við politisku skipanina. Hetta er tó treytað av, at tingmenn veruliga vilja hava skipanina at virka.

**Løgtingið slapp at standa sína roynd**

Spurningurin er so hvussu hetta virkar í praksis. Her er lógin um yrkisráðið fyri lønjavningargrunnin eitt gott og einfalt dømi. Lógin varð lýst 23.mai 1997 og hálvtannað ár seinni var lógin ikki sett í verk. Tískil royndi ein tingmaður tingsins eftirlitsskipan við at seta landsstýrismanninum fyrispurning um málið. Í svarinum kom greitt fram, at tað var tilætlað, at lógin ikki var sett í verk. Orsøkin var tann, at landsstýrismanninum ikki dámdi eitt ískoyti til lógina sum var samtykt av einu samdum tingi. Tískil var nýtt sum grundgeving fyri at lógin ikki var sett í verk at hetta uppskot skuldi stríða ímóti stýrisskipanarlógini. Tað er eisini rætt, at júst hetta er tann **einasta** gyldiga orsøk til hjá einum landsstýrismanni ikki at akta eina løgtingslóg.

**Greiður dómur yvir tingið**

Ein slíkur fyrispurningur skuldi givið tinginum høvi til at geva til kennar mótvegis landsstýrinum, at "lóg er lóg og lóg skal haldast". Fyri at fáa staðfest hvat er rætt og hvat er skeivt hevur fiskimanna-felagið spurt ein danskan serfrøðing á økinum hvørja skyldu ein ráðharri hevur at seta eina tingsamtykt í verk, og hvørja gylduga grund hann kann hava til ikki at gera tað. Hetta er gjørt út frá teirri fyritreyt, at tað eru somu reglur galdandi í Føroyum og Danmark á hesum øki.

Niðurstøðan hjá serfrøðinginum er endurgivin aðra staðni í blaðnum, men hon er fullkomaliga greið:

1. Einhvør ráðharri ella landsstýrismaður hevur eina ótreytaða skyldu at seta ein samtykta lóg í verk uttan mun til hvat hann sjálvur heldur um hana.

2. Grundgevingin hjá landsstýrinum fyri ikki at seta lógina um yrkisráð í gildi er virðisleys. Løgtingslógin um yrkisráð er fullkomiliga í tráð við stýrisskipanina.

Hetta merkir, at landsstýrið hevur brotið § 5 í lógini um ábyrgd landsstýrismanna í hesum førum:

1. Løgmaður/landsstýrismaður hevur tilætlað skúgva til viks tær skyldur hann hevur samb. stýrisskipanarlógina og lógina um lønjavningargrunnin.

2. Løgmaður/landsstýrismaður hevur givið løgtinginum skeivar og villeiðandi upplýsingar í hesum máli.

Hvat ger løgtingið so við hesa óhoyrdu provokatión hjá landsstýrinum, har tað skúgvar til viks eina greiða einmælta løgtingssamtykt og enntá sigur ósatt fyri tinginum um sama mál. Hóast hetta skuldi verið eitt álvarsmál hjá løgtinginum, at tess lógir ikki eru meira virdar enn hetta, letst tað yvirhøvur ikki um vón. Eingin uttan spyrjaran tekur orðið og landsstýrið fær ta greiðu fatan, at løgtingið letur sær lynda hesa mannagongd.

**Løgtingsmenn undanstøkkingar**

Løgmaður føldi seg enntá so tryggjan at nakrar dagar aftaná kemur løgmaður við einum uppskoti um at avtaka yrkisráðið, uttan at tað nakrantíð hevði virkað, takkað verið nevnda lógarbroti hjá landsstrýrinum. Hetta vísti seg at vera leyst og liðugt og samgongulimirnir í løgtinginum hildu tað vera í fínasta lagi at avtaka eina einmælta løgtingslóg, sum ikki var sett í verk, bert tí landsstýrinum dámdi ikki ta broyting sum **løgtingið sjálvt** hevði skotið upp og samtykt. Hetta má vera heimsmet í undanstøkking hjá einum tingi. T.v.s. burtursæð frá í Russlandi **fyrr.** Sjálveyðmýkingin av tinginum verður undirstrika av, at løgmaður undir viðgerðini av hesum løgtingsmáli gav somu skeivu og/ella villleiðandi upplýsingar, sum tá nevndi fyrispurningur varð settur fram. Og tá málið kom til 3.viðgerð **visti** tingið, at tað varð villleitt. Hóast hetta var eingin samgongutingmaður sum himpraðist við at atkvøða eftir paroluni.



*– Fremsta treytin fyri at vit kunnu fáa fullveldi er at vit hava eitt løgting og ikki eitt "løgting". Her restar ótrúliga nógv í, heldur Óli Jacobsen*

Málið var til viðgerðar í vinnunevndini, sum nóg illa viðgjørdi málið, og sum ikki setti nakran spurning við tær grundgevingar, sum landsstýrið var komið við.

**Andstøðan lítið mætari**

Hetta skuldi annars verið eitt upplagt mál at taka upp í landsstýrismálanevndini, har andstøðan enntá hevur meirilutan. Henda nevndin kundi nýtt hitt tólið í eftirvirkseminum hjá tinginum, nevniliga at seta ein kanningarstjóra at kanna um alt var farið regluliga fram í hesum máli. Tað kundi verið gjørt av bert 10 tingmonnum. Men landsstýrismálanevndin tók ikki málið uppá tungu. Kanska er orsøkin tann, at vit als ikki hava nakra andstøðu yvirhøvur.

**Tamilmálið**

Til sammetingar kann hyggjast at hvussu eitt slíkt mál verður taklað í Danmark. Eitt gott dømi er tamilmálið. Her forðaði Erik Ninn Hansen, løgmálaráðharri, fyri, at nakrir tamilar fingu tann rætt, sum teir áttu eftir lógini. Embætismenn áttu sín leiklut í hesi mannagongd. Forsætisráðharrin villleiddi fólkatingið um málið. Úrslitið gjørdist ein kanning hjá einum "kanningarstjóra". Eitt úrslit av hesum var ein ríkisrættarsak móti ráðharranum. Endin á hesum máli var, at Erik Ninn Hansen var dømdur 40 daga treytað hefti fyri ikki at hava fylgt galdandi lóg, Poul Schluter mátti leggja frá sær fyri at hava villleitt fólkatingið, og embætismenn fingu sekkin fyri at hava medvirkað til hesa undirgraving av galdandi lóg.

Tað verður neyvan nakað slíkt mál aftur í Danmark í bræði. Nú vita danskir ráðharrar og embætismenn nevniliga hvat teir kunnu vænta sær um teir ikki fylgja lógum og reglum og um teir seta spurning við fólkatingið sum hægsta vald.

Í Føroyum kunnu landsstýris- og embætismenn vera tryggir.

Hesar trupulleikar eru landsstýrismenn í Føroyum spardir fyri. Aftaná at løgtingið hevur góðkent mannagongdina við yrkisráðnum er leikluturin hjá tinginum sum eftirlit við landsstýrinum reelt avtikin.

Tað kann neyvan hereftir fara at uppstanda ein støða, har løgtingið kann fara at nýta sínar heimildir á hesum øki, tá tingið fyrst einaferð hevur tikið góðtikið, at landsstýrismaður ikki nýtist at fylgja løgtingslóg, og tá løgtingið hevur tikið til eftirtektar at tað fær skeivar og villeiðandi upplýsingar í einum máli.

Niðurstøðan er tann, at fremsta treytin fyri at vit kunnu fáa fullveldi er at vit hava eitt løgting og ikki eitt "løgting". Her restar ótrúliga nógv í.

**Óli Jacobsen**

*Munurin millum skyldina hjá ráðharrum:*

## At siga sannleikan í Føroyum og í einum skipaðum samfelag

Grundað á royndirnar í málinum um yrkisráð ber nú til at staðfesta munin millum hvussu somu reglur verða útlagdar í Føroyum og í Danmark, sum hevur somu reglur sum skipað samfeløg. Útleggingin hjá Føroya Løgtingi kann nýtast í øllum málum.

Tað er óneyðugt at vera løgfrøðingur fyri at kunna meta um munin, men reelt er skyldan hjá landsstýrismanni at siga satt fyri tinginum, sum er ein tann mest avgerandi fyritreytin fyri eitt rættligt fólkaræði, avtikin.

**Skyldan hjá ráðharrum at siga satt fyri tinginum . Skipan í Føroyum**

"Tað er .. ivasamt um løgmaður úttalar seg løgfrøðisliga, tá hann sigur, at yrkisráðið er (var) í stríð við stýrisskipanarlógina, heldur letur tað til, at hann úttalar seg um tað, sum hann sjálvur heldur vera tankarnar (andin og moralurin í) stýrisskipanarlógini."

**Kristina Samuelsen, cand. jur., skrivari hjá landsstýrismálanevndini, og stuðlað æ Sjúrði Rasmussen, cand.jur, næsti maður stjórans á Løgtingsskrivstovuni. Tað er óneyðugt at siga, at hetta er ein undanførslan sum altíð kann nýtast - aftaná - fyri at hava sagt ósatt fyri tinginum.**

"Sjálvt um vit leggja til grund, at (løgmaður) hevur úttalað seg løgfrøðisliga skeivt um spurningin, er mangt sum bendir á, at henda upplýsing hevur ikki "havt stóran týdning fyri tingsins meting av málinum".

Niðurstøða í notati hjá Sjúrði Rasmussen, cand. jur.

<u>Henda útlegging er tikin til eftirtektar av øllum 32 tinglimum</u>

**Skyldan hjá ráðharrum at siga satt fyr tinginum. Skipan í Danmark og skipaðum londum**

Ministres pligt til at give tinget rigtige oplysninger. I Danmark.

Det danske statsstyre er baseret på en forudsætning om, at regeringen ved sine ministre i udtalelser overfor folketinget giver rigtige og ikke vildledende oplysninger. Denne forudsætning er fundamental i et parlamentarisk folkestyre. Dette gælder uanset om ministre udtaler sig politisk eller juridisk.

*Dr. jur. Peter Blume, professari. Sum tað sæst kann munurin illa vera størri.*

**Ministres pligt at give folketinget rigtige oplysninger. Færøsk ordning.**

For de dansklæsende læsere bringes nedenfor den udlægning af ministres forpligtelse til at give lagtinget rigtige oplysninger, som er udarbejdet af lagtingets jurister, og som har fået tilslutning fra samtlige 32 lagtingsmedlemmer.

Anledningen til denne udlægning er en konkret sag, hvor det kan dokumenteres, at en minister mod bedre vidende i en bestemt sag mod bedre vidende har givet lagtinget forkerte oplysninger.

**Men udlægningen kan selvfølgelig bruges i alle situationer.**

"Det er tvivlsomt, om lagmanden udtaler sig juridisk, når han siger, at udvalget (*som lagtinget havde lovgivet for, men sum ministeren standsede gennemførelsen af*) var i strid med styrelsesloven. Det synes hellere, at han udtaler sig om det som han selv synes at være tankerne (ånden og moralen) bag styrelsesloven."

......

"Selv om vi lægger til grund, at lagmanden har udtalt sig juridisk forkert om sagen, er der meget som tyder på, at denne (forkerte) oplysning ikke har haft afgørende betydning for tingets vurdering af sagen."

Citaterne er fra lagtingets jurister. Selve hovedartiklen bliver tilgængelig på dansk i løbet af nogle dage for dem som skulle have interesse i at sætte sig ind i den færøske parlamentarisme.

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**